## EFTA má halda eykafund

Samtykkir íslendska Altingið uppskotið, sum heimilar stjórnini at taka upp samráðingar við ES um limaskap í samveldinum, fer EFTA at halda eykafund um støðuna. Tað kom fram á fundi, sum uttanríkisráðharrarnir í EFTA-londunum høvdu í Hamar í Noregi í gjár. Ráðharrarnir umrøddu samskiftið millum EFTA og ES og samskiftið millum EFTA og onnur lond, og í sambandi við fundin bleiv fríhandilssáttmáli millum EFTA og Bahrein, Kuwait, Oman, Qatar, Saudiarabia og Sameindu Arabisku Emiratini undirskrivaður. Á fundinum varð upplýst, at samráðingarnar við Peru um ein fríhandilssáttmála eru um at vera lidnar, skrivar Morgunblaðið.

## Sendimaður koyrdur úr Svøríki

Í Svøríki hevur stjórnin koyrt ein starvsmann á kinesisku sendistovuni í Stockholm av landinum, tí sambært myndugleikunum hevði maðurin njósnast um politisk flóttafólk, sum eru komin úr Kina til Svøríkis. Kinesiska stjórnin svaraði alt fyri eitt við at koyra ein svenskan diplomat av landinum. Svenskir fjølmiðlar siga, at málið hevur sín uppruna í, at svenska køgreglan handtók ein mann, sum hevði roynt at fáa upplýsingar um muslimsk flóttafólk, sum eru flýdd úr kinesiska landspartinum Xingijang til Svøríkis. Tann tikni maðurin er svenskur ríkisborgari, og hann kann vænta sær fýra ára fongsulsrevsing, skrivar svenska tíðindastovan TT.

# Elbilur presenteraður á Skálatrøð

**Á felags tíðindafundinum hjá Elfelagnum SEV og DONG Energy í Müllers Pakkhúsi í morgun var ein Mitsubishi iMiEV elbilur presenteraður fyri politikarum og øðrum, sum royndarkoyrdu bilin í býnum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*myndir: Jens Kristian Vang*




*Elfelagið SEV og DONG Energy presenteraðu ein Mitsubishi iMiEV elbil á Skálatrøð*



*Fyrstur at royndarkoyra bilin var Jóhan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum*

Í morgun var felags tíðindafundur hjá Elfelagnum SEV og danska el- og orkufelagnum DONG Energy í Müllers Pakkhúsi í Havn í sambandi við at partarnir eru komnir ásamt um at gera eina samstarvsavtalu, sum varð almannakunngjørd og undirskrivað á fundinum.

Verkætlanin hevur fingið navnið Grani, og tað er Johan Mortensen frá felagnum Baldursbrá, sum saman við SEV hevur tikið stig til verkætlanina.

Í sambandi við fundin høvdu feløgini bæði fingið til láns ein Mitsubishi iMiEV elbil, sum varð sýndur fram og royndarkoyrdur eftir tíðindafundin.

Milum tey sum royndarkoyrdu bilin vóru Jóhan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum, og Heðin Mortensen, borgarstjóri í Tórshavnar kommunu.

Eftir at bilurin varð royndarkoyrdur, var hann koyrdur til bilasøluna Ivan Johansen Bilar við Hoyvíksvegin, sum er Mitsubishi umboð í Føroyum. Har var eisini høvi hjá áhugaðum at síggja og royndarkoyra bilin.

Tey sum royndarkoyrdu bilin, vóru samd um at bilurin var ein sera positiv upplivilng. Hann er sum ein vanligur bilur at koyra. Størsti munurin er tó at hann er so gott sum fullkomiliga ljóðleysur.

Mitubishi iMiEV er ein tann mest væl virkandi og framkomni elbilur til dags dato. Konseptið við Mitsubishi iMiEV er ein eldrivin persónbilur við plássi til fýra vaksin, sum als ikki dálkar og er kvikur og lættur at handara í ferðsluni. El-motorurin hevur 64 hk og hægsta snúningsmomentið er upp á 180 Nm, sum ger bilin eins kvikan og ein miðalklassabil við bensinmotori. Bilurin verður drivin av bakhjólunum, toppferðin er 140 km/t, og hann kann umleið 150 km upp á eina løðing.

Navnið iMiEV kemur av at bilurin er bygdur til elbil yvir ein Mitsubishi i, og MiEV stendur fyri Mitsubishi innovative Electric Vehicle.

**Vit royndarkoyra bilin í dag og hava meira um hann á bilasíðunum í blaðnum í morgin**